## Landaplágur aftur á palli

Fríggjakvøldið á Norðoyastevnu verða landaplágur aftur á palli í KÍ-høllini.

Fyri einum lítlum ári síðani var hendan konsert fyrstu ferð, og hon eydnaðist serstakliga væl, og nú verður tiltakið endurtikið.

Tað er Klaksvíkar Ítróttarfelag, sum skipar fyri konsertini, og hon verður hildin eftir sama leisti sum seinast.

Tað vil siga, at ein bólkur við góðum tónleikarum fer at spæla, og so koma solistar á pallin at syngja sínar kendastu sangir.

Hesaferð verða tað sangarar, sum hava verið við í bólkum sum Frændum, Dynamitt, Føstufressum, Moirae og øðrum.

Rani Nolsøe hevur verið ein av høvuðsmonnunum í Frændum, og hann fer at syngja nakrar av teimum mongu sangunum, sum bólkurin hevur verið frammi við.

Niklas Heri Jákupsson og Hans Jacob Nystrøm úr Dynamitt fara eisini at tríva í onkrar av teimum mongu landaplágunum, sum bólkurin hevur havt, og Anfinn Nielsen fer at syngja sangir sum Útsalg og Cirkus Tinganes.

Umframt teir lokalu solistarnar, kemur eisini ein serligur gestur av meginøkinum. Tað er Terji Rasmussen, sum hevur skrivað eina ørgrynnu av kendum sangum. Hann fer millum annað at syngja Eros og Flýggi til tónleikin.

Konsertin verður í KÍ-høllin fríggjakvøldið kl. 21.00, og vertur fyri kvøldið verður Gunnar Nolsøe.

# John og teir hava nógv at gera



*– Norðoyastevnan er heilt greitt øðrvísi enn gerandisdagurin hjá okkum. Tað er meira at gera, og so at siga allir trupulleikarnir standast av sprutti, sigur John Damberg*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

**– Við hvørt skalt út at spæla grýla móti fólki, sum tú kennir rættiliga væl. Men soleiðis eru treytirnar, og tað er tað, sum vit fáa løn fyri, sigur John Damberg. Hann hevur verið løgreglumaður í Klaksvík seinastu 20 árini, og hann hevur arbeitt á mest sum hvørjari Norðoyastevnu hesi árini**

LØGREGLA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í september mánaði í 1983 kom ein danskur løgreglumaður til Klaksvíkar at arbeiða. Hann hevði fingið eina royndartíð upp á tríggjar mánaðir, og tímdi hann ikki at vera meira, so kundi hann fara heimaftur til Keypmannahavn aftaná teir níti dagarnar.

Men John Damberg treivst væl í Klaksvík, og hann fór hvørki heim eftir teir fyrstu tríggjar mánaðirnar ella fyrstu trý árini. Nú 21 ár seinni er hann framvegis løgreglumaður í Klaksvík, hevur familju og býr í Haraldssundi.

– Eg hevði arbeitt fimm ár í Keypmannahavn og var troyttur av tí. Tí vildi eg royna nakað nýtt og kom til Føroya at arbeiða. Eg veit ikki, fyrst skuldi eg vera tríggjar mánaðir, og síðani var eg áramálssettur í trý ár, men eg gangi her enn, sigur John Damberg.

– Eg arbeiddi á radiodeildini á Nørrebro, tað vil siga, at eg stýrdi løgreglubilunum í Keypmannahavn. Tað var spennandi á tann hátt, at tú visti um alt sum fór fram, men tú vart ikki mitt í øllum.

### Munur á Klaksvík og Keypmannahavn

Í Klaksvík eru málini hjá løgregluni ikki av sama slagi, sum tey vóru á Nørrebrúgv í danska høvuðsstaðnum. Har kundi verða nógvur ófriður, meðan tað yvirhøvur er nógv meira friðarligt í Føroyum.

– Málini eru kanska av einum øðrum slag í Klaksvík, ferðsluóhapp og onkuntíð harðskapur, men tað er líka nógv at gera sum politistur her. Og so er ein annar munur, at hetta er eitt so nógv minni samfelag enn Keypmannahavn.

– Tað merkir, at tú við hvørt skalt út at spæla grýla móti fólki, sum tú kennir rættiliga væl. Men soleiðis eru treytirnar, og tað er tað, sum vit fáa løn fyri, sigur John Damberg.

### Fleiri fólk á støðini fyrr

Í 1984 var John Damberg fyri fyrstu ferð til arbeiðis á Norðoyastevnu, og hann hevur arbeitt mest sum hvørja Norðoyastevnu síðani.

– Norðoyastevnan er heilt greitt øðrvísi enn gerandisdagurin hjá okkum. Tað er meira at gera, og so at siga allir trupulleikarnir standast av sprutti. Men tað er eitt sindur broytt, tí fyrstu árini, eg arbeiddi á Norðoyastevnu, høvdu vit nógv meira fólk inni á støðini, enn vit hava nú, heldur John seg minnast og tekur eina gamla døgnrapport fram.

Hann blaðar eitt sindur og finnur skjótt Norðoyastevnuna í 1984. Tá vóru eini 20 fólk á politistøðini, og alt komst ov nógvum rúsdrekka. Hann kagar síðani í døgnrapportina fyri í fjør, og tá vóru bert sjey fólk á støðini og svóvu.

– Vit hava kanska líka nógv at gera nú, sum vit høvdu fyrr, men vit taka ikki líka nógv fólk við okkum á støðini. Vit royna heldur at koyra tey heim ella til vinfólk at sova rúsin út. Onkuntíð hava vit bara verið úti og vent onkrum, sum hevur ligið og sovið í góðveðrinum, sigur John flennandi.

### Fólk ringja um smáting

Ein orsøk til, at færri fólk verða tikin við á løgreglustøðina, er tað nógva pappírsarbeiðið, sum stendst av hesum.

– Harafturat verður eisini kravt, at ein lækni kannar hvønn tann einasta persónin, sum vit koyra í brummuna. Tað kann virka ov nógv av tí góða við hvørt, og tað er næstan ikki at fáa seg til at senda boð eftir einum lækna mitt um náttina, bara tí onkur hevur drukkið ov nógv, heldur John.

Hóast tað eru færri gestir á politistøðini, so er tað ikki endiliga friðarligari hjá løgreglufólkunum fyri tað.

– Nú hava øll fólk eina fartelefon, og tí verður nógv meira ringt til løgregluna nú, enn tað var áður. Fólk ringja um alskyns smáting, sum í grundini einki hava upp á seg, sigur John.

### Altíð onkur droyur hundur

Við hvørt kann tað tykjast, sum at løgreglufólk fáa lítlan frið á eini stevnu. Drukkin fólk hava til vana at vilja sleppa fram at fólkunum í politibúnanum, men John Damberg heldur, at tað er nógv friðarligari nú, enn tað plagdi at vera fyrr.

– Eg minnist, at fyrstu árini kundu vit ikki koyra niðan gjøgnum Bøgøtu á Norðoyastevnu, tí fólk lupu út fyri politibilin, og øll gjørdu seg upp, men nú varnast tey okkum nóg illa, tá ið vit koyra har. Ja, vit kunnu í grundini saktans vera til gongu og fáa góðan frið.

– Tað er altíð onkur droyur hundur, sum skal hanga um hálsin á tær, men soleiðis er tað bara, sigur John við einum smíli.

### Á vakt í útlandinum

John Damberg hevur tríggjar ferðir starvast fyri donsku løgregluna í útlandinum. Hann hevur verið í Bosnia, Kosovo og á Vestara Áarbakka. Hetta hava verið púra øðrvísi uppgávur, enn tær heima í Føroyum.

– Okkara samfelag er gott, og tað fæst neyvan betur nakra aðrastaðni. Her fáa øll fólk tað neyðugu hjálpina skjótt og væl, meðan aðrastaðni er tað meira, at tann sterkasti yvirlivir, og har eru viðurskiftini langt frá so væl skipað, sum tey eru hjá okkum, sigur John Damberg.

– Vit búgva í einum dunnuhyli, og samfelagið er lítið, men her virkar alt, sum tað skal. Hava fólk brúk fyri hjálp, einum sjúkrabili ella brandbili, so tekur tað bara nakrar fáar minuttir, áðrenn hjálpin er frammi. Soleiðis er tað ikki aðrastaðni í heiminum.

### Møguliga aftur til útlandið

Reglarnar fyri donsk løgreglufólk eru, at tey skulu verða heima í tvey ár, áðrenn tey aftur kunnu fáa eina uppgávu í útlandinum.

– Hetta skilji eg væl, tí tú skalt eisini arbeiða og trívast heima, og tað geri eg. Í løtuni eri eg í karantenu, so eg kann ikki fara avstað aftur fyrr enn einaferð næsta ár. Eg veit ikki, hvussu tað verður, men eg hevði ikki verið kløkkur av mær sjálvum, um eg fór av landinum aftur í eina tíð, sigur John Damberg.

Men næsta árið verður hann so í øllum førum til arbeiðis á løgreglustøðini í Klaksvík, og nú stendur enn ein Norðoyastevna fyri framman.

– Vit ganga sjálvandi í vaktum á Norðoyastevnu, og her er fólk á støðini alla tíðina frá fríggjakvøldinum til mánamorgunin, sigur John, sum skal vera á vakt fríggjakvøldið og sunnukvøldið.

*Nú stendur summarið aftur fyri durum...*



Norðoyggjar hava eina serstaka náttúru, sum er ein einastandandi uppliving. Tilboðini eru eisini fjøltáttað, sum Norðoya Kunningarstova kann veita.

Tað er umráðandi at standa saman, fyri at fáa eitt øki sum okkara, at verða eitt framkomið økið, sum er vert at vitja, eisini er umráðandi at Norðoyggjar við vøkru náttúruni fær so nógv útlendsk ferðafólk, sum gjørligt, at koma hendavegin.

Felagið FERÐAVINNAN Í NORÐOYGGJUM sum rekur Norðoya Kunningarstovu, tjaldingar og hússvognaplássið úti í Grøv, har útibarnagarðurin Fjallafípan húsast, er nú farin í holt við eitt átak sum kann betra um møguleikarnar hjá øllum sum stavast innan ferðavinnuøkið og vinnuna sum heild, ikki minst fyri at fáa fleiri ferðandi at vitja í Norðoyggjum.

Tjaldingarplássið, kamping- og húsvognaplássið verður tikið í nýtslu summarið 2003.

Kunningarstovan skipar fyri og leggur til rættis: Gongutúrar, bátaútferðir, ferðir runt í Norðoyggjum við ferðaleiðara, bæði fyri einstaklingar og bólkar. Eisini skipað vit fyri útferðum úr Norðoyggjum til aðrar oyggjar.

Tí fara vit at heita á tykkum at tekna teg, húski, handil, virki ella stovn tykkara sum lim í felagnum FERÐAVINNAN Í NORÐOYGGJUM.

Limagjaldið er:
Kr. 100,00 um árið fyri húski ella einstaklingar
Kr. 500,00 um árið fyri handlar, virkir og stovnar

VASTI 457171

**TEKNA TEG VIÐ AT SENDA HENDA LEPAN INN...**

☐ Ja, eg tekni meg sum lim í felagnum Ferðavinnan í Norðoyggjum

Navn:
Gøta:
Býur/bygd:
Telefon:

**FERÐAVINNAN Í NORÐOYGGJUM OG NORÐOYA KUNNINGARSTOVA**

Nólsoyar Pálsgøta - FO-700 Klaksvík - Føroyar - Tel. 456939 - Fax 456586 - info@klaksvik.fo